### Sámal Erik Hentze:

# Vit duga ikki at spæla bólt

**VODAFONEDEILDIN** Tað segði nýggi venjarin hjá AB, Sámal Erik Hentze, eftir dystin á Argjum. Tá avtornaði, vunnu fuglfirðingar ein greiðan 4-1 sigur á argjamonnum, sum ikki fingu spælið at koyra eftir at Evrard Blé fór av vøllinum við skaða

Tróndur Arge

| | |
|---|---|
| AB | 1 |
| ÍF | 4 |

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá fuglfirðingum seinastu tíðina. Tað er bara blivið til fýra stig í teimum seinastu fimm dystinum, umframt at teir taptu steypa-finaluna ímóti EB/Streymi. Tí skuldi ÍF reisa seg í gjár á Argjum, meðan AB hevur sína søk fyri í niðurflytingarstríðnum.

– Hetta skuldu vit havt gjørt eina viku fyrr, men burtur sæð frá tí, so eri eg væl nøgdur. Vit fáa eisini fýra mál, og tað var týdningarmikið, tí vit hava ikki skorað í teimum seinastu trimum dystinum, sigur ein fegin Ábraham Løkin eftir dystin.



**Ja vit spæla faktist slett ikki fótbólt allan seinna hálvleik**

SÁMAL ERIK HENTZE

### Argjamenn væl við í fyrra hálvleiki

Argjamenn vóru væl við í fyrra hálvleiki. Teir byrjaðu eisini dystin í betri og Evrard Blé tóktist hava funnið stórformin fram. Við tekniskum detaljum og frekum dribblingum sum fáur í Føroyum kann gera honum eftir, var hann upphavsmaður til teir møguleikarnar, sum argjamenn høvdu í fyrra hálvleiki.

– Eg eri nøgdur við fyrra hálvleik sum heild. Eg haldi at vit byrja væl og vit fáa ÍF at gera tað, sum vit vilja. Síðani gera vit tveir feilir og tað revsar ÍF beinanvegin. Vit eru alíkavæl við allatíð og fáa eisini minkað um munin beint fyri hálvleik, sigur Sámal Erik Hentze.

### Skaðar skaða AB

Longu aftaná 17. minuttir má AB gera sína fyrstu útskifting, tá Dion Spildt takkar fyri seg vegna skaða. Tá ein hálvur tími er farin, fær Evrard Blé eisini ein skaða, sum ger, at hann í hálvleikinum má lata seg útskifta.

– Tað kom serliga illa við, at Evrard Blé fór út við skaða. Hann er bindiliðið á liðnum og eftir at hann fór út, eru vit ov tunnir og fáa ikki spælið at hanga saman. Vit eru ikki nóg góðir við bóltinum og tí kom tað serliga illa við, at tað var Blé, sum fór av vøllinum, tí har er hann góður, sigur Sámal Erik Hentze.

### ÍF leggur seg á odda

Tíggju minuttir fyri hálvleik leggur Bartal Eliasen ÍF á odda 1-0. Eftir horna fær hann fatur á bóltinum og í leysari luft vendir hann sær og smekkar bóltin í AB málið. Løtu seinni er tómt í høgru síðu hjá AB og tað verður revsað av fuglfirðingum. Jan Ellingsgaard smekkar til og bólturin fer flatt í handara síðu net.

– Vit spæla rímuliga væl, men tað situr í monnunum, at tað hevur gingið so illa í seinastu. Menn koma ikki orduliga inn í dystin, fyrr enn vit hava víst, at vit kunnu aftur. Nú fingu vit víst, at vit kunnu spæla eina góðan dyst, sigur venjarin hjá ÍF, Ábraham Løkin.

Í seinasta minutti av fyrra hálvleiki minkar Mortan úr Hørg um munin 2-1 eftir innlegg úr vinstru. Bólturin sleppur at trillar framvið øllum inni í fimm metrinum og við handaru stong stendur ein leysur Mortan úr Hørg og skorar lætt.

### Avgerandi løtan

Avgerandi løtan fyri ÍF sigurin kom átta minuttir inn í seinna hálvleik. Jan Ellingsgaard sendi innlegg innfyri úr vinstru og innfyri kom øll AB verjan uppá millumhond. Tað endaði við, at Øssur Dalbúð stútar bóltin í næstan tóma AB málið.

– Í seinna hálvleiki fáa teir eitt mál tíðliga og eftir tað gloyma vit at spæla fótbólt. Ja vit spæla faktist slett ikki fótbólt allan seinna hálvleik, sigur ein vónbrotin Sámal Erik Hentze.




*Afturvendi Bartal Eliasen byrjaði málveitsluna á Argjum.*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Broytt ÍF-lið

ÍF liðið til dystin í gjár, varð eitt sindur broytt frá tí vit hava sæð í ár. Hvørki Andy Olsen ella Dánjal á Lakjuni vóru at finna vengrinum. Teir hava spælt ávíkavist mest og fjórð mest fyri ÍF í ár.Í staðin hevði Ábraham Løkin valt Nenad Saric og Jan Ellingsgaard á hvørsínum vongi.

– Vit valdu spæla við Nenad Saric og Jan Ellingsgaard á hvørsínum vongi. Nenad er skjótur og kann spæla á vonginum, meðan Jan Ellingsgaard er ein framrættaður leikari, sum hevur spælt á bakkinum í tvey ár. Hann er blaðungur og fyrr ella seinni skal hann hava kjansin longur frammi. Eg haldi tað var rætt at royna nakað nýtt í dag, tí vit hava ikki skorað í teimum trimum seinastu dystinum, sigur Ábraham Løkin.

Andy Olsen tykist ikki hava hug at sita á bonkinum, tí hann gjørdi um seg eftir hann kom inn. Eitt mótálop endar við, at Andy Olsen lyftir bóltin í einum bleytum boga uppá Símun Rógva Hansen í AB málinum og skorar til endaliga úrslitið 4-1 til ÍF.

– Onkrir av leikarunum hava kanska hugsa, at tað er ógjørligt, at fáa heiðursmerki, men stemningurin í dag vísti, at menn trúgva aftur uppá tað. Vit fara so at gera eina roynd, at røkka einum heiðursmerki, sigur Ábraham Løkin at enda.

ÍF vann saman um ein greiðan sigur á argjamonnum, sum hava langt á mál, um teir skulu spæla sunnudags fótbólt komandi ár.

*trondur@sosialurin.fo*

## Alex, Jobin og Tummas ikki við

AB var í dag uttan Alex Mellemgaard, Jobin Drangastein og Tummas Justinussen, sum allir eru farnir til danmarkar á fótbóltsskúla. Argjamenn hava eisini verið hart raktir av skaðum í ár, í dag sita millum annað Heðin Stenberg, Morten Overgaard og Rói Danielsen uttanfyri, meðan Dion Spildt og Evrard Blé blivu skaddir í dag. Tað ger uppgávuna hjá Sámali Erik torføra á Argjum.

– Tað er trupult, tí tú kanst spæla ein dyst og síggja nøkur góð ting, men til næsta dyst eru teir somu menninir inni tøkir. Aftur í dag síggi eg nøkur góð ting, men nú gerast onkrir av teimum skaddir. Tað ger, at vit eru sera leitandi í løtuni. Tað tekur tíð at spæla nakað saman, men hon er við at renna út. Vit hava einar átta leikarar á skaðalistanum, so tað frustrerandi, sigur Sámal Erik Hentze.

Tó so, so er Sámal Erik vísur í, at AB fer at klára at sigla millum skerðini.

– Vit verða omanfyri niðurflytingarstrikuni, men vit mugu finna ein leist og stabilitet, so skal tað nokk ganga, sigur Sámal Erik at enda.

*trondur@sosialurin.fo*